tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 89 Fríggjadagur 10. mai 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00

# Oljukanningar úr Lopra og suður móti markinum

*Russiska skipið Academic Strakov skjýtur seismikk fyri BP og Shell sunnanfyri Suðuroynna - fólk frá týskari fyritøku seta lurtiútgerð upp í Lopra og á Akrabergi*

**síða 10**



## Sjálvstýrisflokkurin tváar hendur:

# Hinir oyðslaðu í áttatiárunum

*Hóast sjálvstýrisflokkurin var við í øllum samgongum í áttatiárunum, so plaserar formaðurin Helena Dam á Neystabø ábyrgdina fyri áttatiárini og hon liggur ikki hjá Sjálvstýrisflokkinum*

**síða 6**

## *Nú skal greiða fáast á hvør eigur VMF:*



*Tað var tann tíð, tá ið alt var so sára gott. Fyrst tók politiskt stríð seg upp. Síðan eitt navnastríð. Nú skal trætan avgerast einaferð millum alla. Vanlig demokratisk siðvenja ikki ikki nøgmikið hjá hovuðkambunum í Verkamannafylkini*

# Fútaforboð ímóti Óla, Kristiani og Axel

*Málið um hvør umboðar Verkamannafylkingina er nú vorðið so álvarsamt, at sakførari er settur at greiða fløkjuna. Og kemur tað heilt til skarpskeringar er meiningin at fáa evsta politimyndugleikan í landinum, fútan at avgreiða trætuna*

**síða 5**

**STANLEY**
**við Norðskála**

letur upp aftur við nýggjum eigarum, leygardagin kl. 9.00.

Sí lýsingartilboð í blaðnum leygardagin.

**STANLEY**
**v/ P/f JÓMAR**
**Tlf. 22270**
**460 Norðskála**

*Spónurin settur í greytin - BP og Shell til verka í Føroyum:*

# Gera nú kanningar úr Lopra og suður til markið

*Russiska skipið Academic Strakov skýtur seismikk fyri BP og Shell sunnan fyri Suðuroynna - fólk frá týskari fyritøku seta lurtiútgerð upp í Lopra og á Akrabergi*



David Philip frá BP og Karsten Schuler frá Geo Pro í ferð við at grava niður geofonir ta útgerð sum skal taka ímóti seismikkbylgjum skotnar frá skipi

Jan Muller

Tvey av heimsins størstu oljufeløgum eru nú av alvara farin at vísa føroysku undirgrundini ans. Talan er BP og Shell. Hetta eru einini tey feløgini, sum eru mest virkin vestan fyri Hetland og standa tey m.a. fyri fyrstu oljukelduni, sum fer undir framleiðslu har um góðan mánað.

BP og Shell eru millum oljufeløgini, sum longu hava keypt seismisku kanningarnar hjá Western á føroyskum øki. Tey eru eisini við í Lopransætlanini.

Men nú hava hesi bæði oljufeløgini sett skjøtulin á egið kanningararbeiði á føroyska landgrunninum.

Talan er um eitt framkomið slag av seismiskari kanning, sum verður nevnd OBS, ið stendur fyri On Bottom Seismikk.

Lurtitól verða sett á havbotnin og verður síðani skotið við seismikki frá skipi.

Við OBS kanningini verða lurtitól sett á havbotnin og tikin uppaftur at avlesa, tá skjótingin er av.

Hetta er kanning av sama slag, sum Statoil, Mobil og Enterprise gjørdu í fjør.

**Seta upp lurtiútgerð**

Til at gera uppgávuna hava BP og Shell fingið eitt týskt sérfrøðingafelag innan geofysikk, Geo Pro í Hamburg. Felagið hevur leigað eitt stórt russiskt seismikkskip, Academic Nicolai Strakov, til uppgávuna. Tað arbeiðir í løtuni inni á føroyskum øki.

Skipið var í vikuni bert ein fjórðing úr Akrabergi. Tað arbeiðir eftir eini linju úr Lopra og í ein landssynning móti oljukelduni Foinaven hinumegin markið, sum BP og Shell reka.

Í sambandi við hesa kanningina eru fólk frá Geo Pro í Suðuroy. Karsten Schuler er útbúgvin geofysikkari og hevur nú í eina viku sett upp lurtiútgerð á fýra ýmsum plássum í oynni, eitt nú við borholið í Lopra.

BP og Shell ynskja við hesi kanningini at fáa neyvari vitan um løgini undir basaltinum í tí umrødda økinum. Tí at arbeitt verður her út frá kendum løgum vestan fyri Hetland, har teir hava funnið olju.

Russiska seismikkskipið kemur á Havnina mánadagin.



David Philip frá BP setur upp lurtiútgerð á Akrabergi



Karsten Schuler, geofysikkari hjá týsku fyritøku Geo Pro er her í ferð við at festa eitt tól omaná borikranan í Lopra. Hetta tólið stendur beinleiðis í sambandi við fylgisvein og hevur við sjálva tíðina, tá mátingarnar verða gjørdar umborð á seismikkskipinum at gera. Myndir Áki Bertholdsen

THE WORLD COUNTS ON
TRULY®




MD 183/kr. 595,-

7 hentar skipanir:

✔ Roknimaskina
✔ Minnisblað
✔ Tlf., Fax & Navnaskrá
✔ Tíðarætlan
✔ Alarmur
✔ Klokka
✔ Almanakki

SPARD KRÓNA ER VUNNIN KRÓNA

pappírslonin

Sverrisgøta 9 • FR-110 Tórshavn
Tlf. 10603 • Fax 10806 • Box 195